**Bilar**

**– serblað í Sosialinum 13. mai 2004:**

**Blaðfólk:**
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tel 216135

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
tel 216409

**Myndafólk:**
Álvur Haraldsen
Jens Kristian Vang

**Lýsingar:**
Gudny Langgaard
gudny@sosialurin.fo

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Umbróting:**
Sp/f Sosialurin

**Plátutilgerð:**
Sp/f Hestprent

**Prent:**
P/F Prentmiðstøðin

**Upplag:**
8.200

**Evstamark:**
9. mai 2004

Síðani 1995 hevur Sosialurin havt fastan bilateig í blaðnum. Teigurin er í blaðnum hvønn hósdag. Endamálið er at kunna um tað nýggjasta á bilamarknaðinum, at upplýsa um bilar og bilasøgu annars, um bilastarvsgreinina og um ferðslutrygd.

Síðani 2000 hevur Sosialurin einaferð um árið givið út eitt serblað um bilar, nevnt Bilar.

© Sosialurin 2004

## Lesarin við á altjóða bilaframsýning

Hetta er 10. árið Sosialurin skrivar um bilar og bilbransjuna. Upprunin var teigurin »Út at koyra«, sum seinni varð til »Bilar«. Samstundis er hetta eisini 5. árið, at Sosialurin gevur út serblað um bilar.

Hóast sølan av nýggjum bilum er minkandi í løtuni, so er áhugin stórur fyri tí sum rørir seg í bilaverðini – vit hava jú øll áhuga fyri bilum, so ella so. Bilurin er týdningarmesta flutningstólið, vit hava.

Hesaferð hava við gjørt meira enn vanligt burturúr við at bjóða lesaranum við til altjóða bilaframsýningina, Copenhagen Motor Show 2004 í Bella Centrinum, sum var frá 16. til 25 apríl.

Ein stórur partur av myndunum í blaðnum eru tiknar í Bella Centrinum, har fleiri hundrað akfør vóru sýnd fram.

Har var nógv nýtt at frætta, bilar, sum eru á veg og aðrir bilar, sum koma seinni í ár og næsta ár, umframt fleiri konseptbilar og designstudie, sum vit tó ongantíð koma at síggja um okkara leiðir.

Har vóru bilar í øllum klassum úr fleiri milliónum niður um 100.000 krónur.

Fyri biláhugað er tað altíð áhugavert at síggja nógvar ymiskar bilar verða sýndar fram.

Vónandi fær lesarin við hesum blað innlit í, hvat nýtt bilvinnan hevur at bjóða.

# Landsins størsti brúktbilamarknaður




**Skalt tú lýsa tín brúkta bil til sølu, so er at lýsa har, sum flest fólk síggja lýsingina. Sosialurin og Portalurin hava landsins største brúktbilamarknað. Lýsir tú brúkta bilin til sølu í Bilatorginum í Sosialinum sæst hann eisini á Bilamarknaðin á Portalinum**

BRÚKTBILASØLA

Seinastu árini hevur Sosialurin havt Bilatorgið í blaðnum hvønn hósdag. Har hava bæði bilasølur og privatfólk lýst brúktar bilar til sølu.

Hendan tænastan er nú útbygd í samstarvi við Portalin hjá Føroya Tele.

Á »Marknaðinum« á www.portal.fo er Bilmarknaðurin, sum Sosialurin umsitur.

Lýsir tú bilin til sølu einaferð í Bilatorginum, so stendur hann á Bilamarknaðinum á Portalinum í eina viku. Kostnaður fyri hetta er 250 kr írkoknað meirvirðisgjald.

Við at samlýsa bæði í Sosialinum og á Portalinum fær lýsarin meira burturúr. Portalurin er Føroya nógv mest vitjaða heimasíða – hann hevur umleið 10.000 vitjanir um dagin – og um ein brotpartur av teimum klikkja seg inn á Bilamarknaðin, so sæst lýsingin har sera væl.

Á Portalinum liggja bilarnir í einum dátabása, har til ber at leita bæði upp á bilasølur, merki, lit, koyrdar kilometrar, árgang, prís o. s. fr.


BILATORGIÐ

Bilatorgið, sum er í Sosialinum hvønn hósdag. Nú ber eisini til at síggja lýsingarnar á  Bilamarknaðinum á Portalinum




*Jákup Klein Olsen, Ludvík Petersen, Jens Petur Jensen, Birgir Dam Jacobsen og Frits Dam Jacobsen uttan fyri bilasøluna Nordcar við Velbastaðvegin. BMW og Fiat-umboðini fara at halda til í somu hølum næstu árini, men ætlanir eru um at byggja ein bilterminal oman fyri bygningin hjá Norðbil við Oyggjarvegin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# BMW komið aftur á slóðina

**Norðbil í Havn hevur saman við Jens Petur Jensen og Jákupi Klein Olsen sett á stovna bilasøluna, Nordcar, ið hevur tikið yvir umboðini BMW og FIAT, sum Bilfríðkan hevur havt seinastu árini**

NÝTT UMBOÐ

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað var Martin Dam Jacobsen í Havn, sum í 1969 fekk umboðið fyri týsku BMW bilarnar – sum tann fyrsti í Føroyum.

Vegna bygnaðarbroytingar millum BMW og Honda í Danmark, læt Norðbil BMW-umboðið frá sær í 1989, tá Bilfríðkan við Ludvík Petersen tók yvir.

Nú hevur Ludvík Petersen valt at selja umboðið aftur – eisini Fiat-umboðið, sum hann tók við eftir Frits Jensen.

Hóast tað er Norðbil, sum eigur meginpartin – 70% av nýggja felagnum, Nordcar, so er ikki ætlanin at leggja feløgini saman. Nordcar leigar hølini sum Bilfríðkan eigur við Velbastaðvegin, og har verður felagið næstu árini.

Ætlanir eru um at byggja ein bilterminal við Oyggjarvegin oman fyri Norðbil, har BMW, Fiat, Honda, Huyndai og Skoda skulu hýsast undir einum taki, men í hvør sínari deild. Tað er vorðið alt meira vanligt aðrastaðni, at bygdir verða slíkir bilterminalar, ið hýsa fleiri bilmerkjum – men í hvør sínari deild.

Tað er Jens Petur Jensen, sum er stjóri í Nordcar. Hann eigur 20% av partapeninginum, og Jákup Klein Olsen, sum hevur starvast sum goymsluleiðari hjá Bilfríðkuni seinastu 13 árini, eigur 10% av partapeninginum.

Nýggju eigararnir leggja dent á, at allir teir gomlu kundarnir skulu kenna seg væl, eins og at allir nýggir kundar skulu verða hjartaliga vælkomnir. Ongar broytingar eru í starvsfólkaviðurskiftunum – uttan tann, at stjóri nú er Jens Petur Jensen.

Aron Justinussen heldur fram sum verkførari og Sofus Lognberg á plátuverkstaðnum.

– Tað eru gjørdar stórar íløgur í amboð til bæði merkini hjá okkum, eitt nú eru nýggir testarar keyptir. Vit leggja stóran dent á at verða dagførdir – og tað var sjálvandi eisini eitt krav niðrifrá, tá vit tóku yvir umboðini, sigur Jens Petur Jensen.

Fyrstu Fiatbilarnar hjá Nordcar komu í síðstu viku, og í næstu viku kemur øll BMW-serian – ella átta bilar, teirra millum ein sera spennandi BMW X5 við allari útgerð.

## Isetta vakti áhugan fyri BMW

Týsdagin 11. mai vóru liðin 40 ár síðani, at Martin Dam Jacobsen stóð sveinaroyndina sum bilmekanikari. Hann lærdi hjá Vilhelm Nielsen. Hann fekk sær seinni egið verkstað í kjallarnum í sethúsunum í Hornabø, og í 1969 fekk hann umboðið fyri BMW.

– Tað var tá Johan Evensen, systkinabarnið, kom heim við einum BMW Isetta og eini BMW motorsúkklu 250cc, at eg fekk hug á BMW, greiðir Martin Dam Jacobsen frá.

Seinni, tá Martin Dam Jacobsen var í Danmark, keypti hann sær eina BMW Isetta. Hetta endaði við, at hann setti seg í samband við Nick Christiansen, stjóra hjá BMW í Danmark – og slapp at umboða BMW í Føroyum.



*Á útferð við BMW Isetta í 1968. Birgir Dam Jakobsen uppi á kúfangaranum og mamman, Sanna*